# Karl Martin og Rúna við nýggjari jólafløgu

**Bæði nýggir og gamlir jólasangir eru at finna á jólafløguni við Karl Martini Samuelsen og Rúnu á Heygum, sum kom út í gjár**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fyri góðum 10 árum síðani kom eitt jólaband út við Karl Martini Samuelsen og Rúnu á Heygum. Hetta bandið var væl umtókt, og tað er eisini ein høvuðsorsøk til nýggju jólafløguna við teimum báðum, sum út í gjár.

– Fólk spyrja ofta eftir bandinum hjá okkum, tí tað fæst ikki longur. Vit ivaðust í, um vit skuldu geva bandið út aftur, men endin var, at vit gjørdu eina fløgu við nøkrum av teimum gomlu sangunum umframt nakrar spildurnýggjar, sigur Karl Martin Samuelsen.



*Karl Martin Samuelsen við nýggju jólafløguni, sum hýsir bæði gomlum og nýggjum jólasangum*

## 12 sangir

Á nýggju fløguni eru 12 sangir. Av teimum eru fýra spildurnýggir. Karl Martin Samuelsen syngur tríggjar av teimum, meðan Kim Hansen syngur tann fjórða.

Millum teir gomlu sangirnar er best kendi sangurin frá útgávuni seinast í áttatiárunum. Tað er »Største gávan«, sum Karl Martin og Rúna syngja í felag.

## Snøggur húsi

Karl Martin Samuelsen, Kim Hansen, Jógvan Olsen og Heri Nolsøe hava skrivað orð og løg til nýggju sangirnar.

Johannus á Rógvi Joensen hevur framleitt nýggju sangirnar, og fløgan er ljóðblandað í Media Sound í Keypmannahavn.

Sera snøggi húsin er prýddur við listarverki hjá Amariel Norðoy. Litríka kápan er jólalig og innbjóðandi.

Fløgan fæst nú kring landið og kostar 159 kr.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Skrið ella stormur av landsynningi, seinnapartin skrið av útsynningi. Stundum regn og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og lítið ella einki avfall, men mjørki í støðum. Hitin millum 7 og 11 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷13 |
| Ammassalik | ÷10 |
| Saint John's | ÷2 |
| Halifax | 4 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 14 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | ÷14 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | ÷3 |
| Kiev | ÷10 |
| Bukarest | ÷5 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 10 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 19 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 32 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa. á 48N-37V fer móti Íslandi og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjamorgunin.




Eitt djúpt lágtrýst yvir Íslandi fer spakuliga norðureftir og kuldabrúgvin haðani fer eystarum Føroyar í kvøld.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/12 kl. 06[00]– 06/12 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 5,0°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 05/12 kl. 06[00]– 06/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 23,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

6. des.: Mánin næstur jørðini
7. des.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. des | — | 12.10 | 11.10 | 23.48 | 11.25 | — | 01.30 | 14.10 | 02.30 | 15.10 | 10.25 | 23.03 | 09.25 | 22.03 | — | 12.25 | 00.45 | 13.25 | 11.55 | — | 00.30 | 13.10 |
| 8. des | 00.48 | 13.26 | — | 12.26 | 00.03 | 12.41 | 02.48 | 15.26 | 03.48 | 16.26 | 11.41 | — | 10.41 | 23.04 | 01.03 | 13.41 | 02.03 | 14.41 | 00.33 | 13.11 | 01.48 | 14.26 |
| 9. des | 01.49 | 14.13 | 00.49 | 13.13 | 01.04 | 13.28 | 03.49 | 16.13 | 04.49 | 17.13 | 00.04 | 12.28 | 11.28 | 23.51 | 02.04 | 14.28 | 03.04 | 15.28 | 01.34 | 13.58 | 02.49 | 15.13 |
| 10. des | 02.36 | 14.59 | 01.36 | 13.59 | 01.51 | 14.14 | 04.36 | 16.59 | 05.36 | 17.59 | 00.51 | 13.14 | — | 12.14 | 02.51 | 15.14 | 03.51 | 16.14 | 02.21 | 14.44 | 03.36 | 15.59 |

5 707265 100050 >